Samgongutingmenn um Gallup-kanning:

# Úrslitið er ikki óvæntað




*Kaj Leo Johannesen úr Sambandsflokkinum og John Johannessen úr Javnaðarflokkinum eru ikki bilsnir av úrslitinum av Gallup-kanningini í Tarablaðnum*

**Báðir samgongumenninir Kaj Leo Johannesen og John Johannessen eru samdir um, at útlendingapolitikkur landsstýrisins ikki hevur verið nøktandi. Tí kemur úrslitið av meiningakanningini í Tarablaðnum ikki sum eitt snarljós av klárum himli**

ÚTLENDINGA-POLITIKKUR

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Sambært eini Gallup-kanning, sum varð kunngjørd í Tarablaðnum í síðstu viku, er meira enn ein triðingur av Føroya fólki ónøgt við tann førda útlendingapolitikkin hjá sitandi landstýri. Spurningurin í kanningini var: Hvussu ert tú nøgd/ur við útlendingapolitikk landsstýrisins?

68 prosent av teimum gott og væl 500 spurdu søgdu seg vera ónøgd við politikkin hjá innlendismálaráðnum, meðan 25 prosent vóru nøgd við politikkin hjá Jógvani við Keldu í innlendismálaráðnum. Sjey prosent svaraðu, at tey ikki vistu, hvat tey halda um útlendingapolitikkin.

Kanningin varð umrødd í Sosialinum í gjár, og Jógvan við Keldu segði, at hann var sannførdur um, at hesi tølini fóru at broytast við tíðini.

### Hetta var væntandi

Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, sigur, at hetta úrslitið als ikki kemur óvart á hann.

– Hetta var væntandi, og eg eri als ikki yvirraskaður av úrslitinum. Hetta vísir eisini, at handfaringin av útlendingapolitikkinum ikki hevur verið nøktandi, og Jógvan hevur eisini ásannað, at mistøk eru gjørd, sigur Kaj Leo Johannesen.

Kaj Leo vísir á, at ein slík kanning er eitt íkast til ta demokratisku tilgongdina, og hon gevur eina greiða ábending um, at tey fæstu standa aftanfyri politikkin í innlendismálaráðnum.

Hann sigur víðari, at bara bíðitíðin eftir svari úr innlendismálaráðnum hevur verið ov long.

– Danska útlendingastýrið fylgir altíð tilmælinum frá innlendismálaráðnum, og Jógvan við Keldu kann føra tann politikk, sum honum lystir, sigur Kaj Leo, sum leggur afturat, at danska lógin einki samband hevur við trupulleikarnar á útlendingaøkinum.

### Ikki nøktandi

John Johannessen, ið hevur verið framsøgumaður hjá Javnaðarflokkinum, sigur, at hann fleiri ferðir hevur víst sína ónøgd við málsviðgerðina í innlendismálaráðnum.

– Tað er púra greitt, at embætisførslan í innlendismálaráðnum ikki hevur verið nøktandi, sigur John Johannessen, og tí er hann heldur ikki tikin á bóli yvir úrslitið av hesi kanningini.

Hann vísir á, at fleiri limir í samgongutinglimir ikki taka undir við politikkinum hjá Jógvani við Keldu.

– Eg havi fingið lyfti um, at útlendingapolitikkurin verður tikin upp á komandi samgongufundi, og eg haldi ikki, at Jógvan við Keldu hevur stuðul í samgonguni, sigur John Johannessen og leggur afturat, at hann her sipar til samgonguna í løgtinginum.

### Klárt í heyst

Jógvan við Keldu er farin í gongd við eina útgreining av útlendingapolitikkinum, sum verður gjørd av embætismonnum í innlendismálaráðnum saman við einum politiskum fylgibólki við einum umboði fyri hvønn flokk.

Jógvan við Keldu roknar við, at hetta arbeiðið verður liðugt í heyst. Hósdagin segði hann við Útvarp Føroya, at hann helst sá, at útlendingaøkið verður yvirtikið í nærmastu framtíð, og at ein føroysk lóg verður smíðað, men óvíst er, um politisk undirtøka er fyri hesum.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

## Heri Thomsen á íslendskum hondum

**Størsta flutningsfyritøkan í Føroyum, P/F Heri Thomsen, varð fyri ólavsøku selt til Eimskip**

VINNULÍV

*Stefan í Skorini*

– Tað er við sorgblídni, at vit hava tikið hesa avgerðina, men ein heildarmeting av útlitunum í vinnuni sigur okkum, at hetta var tað optimala, sum vit kundu fáa burturúr nú, og tað var ikki serliga lokkandi hjá okkum at halda fram, sigur Tórhallur Thomsen, stjóri í P/F Heri Thomsen, sum nú er selt til íslendska felagið Eimskip.

Í november í fjør keypti fyritøkan farmaskipið Norland, sum sigldi millum Føroyar og evropeiska meginlandið, men hetta skipið verður nú drigið inn í virksemi hjá Skipafelagnum. Enn er ikki greitt, hvat verður av hesum skipinum.

– Vit roknaðu ikki við at fáa yvirskot frá fyrsta degi, men útlitini síðan november eru versnaði og fyritreytirnar broyttar, sigur Tórhallur Thomsen, og her hugsar hann serliga um, at oljuprísurin hækkar, og nøgdirnar av fiski, ið koma uppá land, eru minkandi.

Hann leggur afturat, at felagið kundi hildið fram sum áður, men hetta var ikki serliga áhugavert í løtuni.

### Yvirkapasitetur

Tórhallur Thomsen heldur, at kappingin innan farmaflutning er ov hørð, og tað hevur verið ein yvirkapasitetur á økinum. Sambært Tórhalli hevur kappingin verið beinhørð, og eingin hevur fingið nakað serligt burturúr.

Hann er hinvegin ikki bangin fyri, at kappingin innan farmaflutning ikki verður nóg hørð í framtíðini.

– Vit hava tríggjar aktørar innan farmaflutning, sum eru Eimskip (Skipafelagið), Samskip og Smyril Line, og teir fara at syrgja fyri, at kapping verður á hesum økinum, sigur Tórhallur Thomsen.

Tórhallur Thomsen heldur fram sum stjóri í P/F Heri Thomsen, sum hevur 30 bilar, ið flyta farm kring landið. Hetta virksemið verður óbroytt framyvir. Fyritøkan varð sett á stovn í 1957.